

Brillur og tenn
– meira skal ikki til!



Blómugentan



Hygga eg... og eg.. og eg..



Franskt karneval

# Grýluløta á B





FØSTULÁVINT
*Lagt til rættis: Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Hvat fert tú at vera á føstulávint? Fremsti grýlu- og dramahandilin í landinum man vera Skortur í J. Broncksgøtu. Har fæst alt innan føstulátintsútgerð: klæði, smyrsl, parykkar, brillur, handskar, hattar, skortar, negl og tenn, fyri at nevna ein lítlan part av fjølbroytta, litfagra og herliga úrvalinum.

Í grimdarregninum í gjár fingu vit tað hugskot, at leggja leiðina framvið. Men longu úti á parkeringsplássinum var greitt, at hetta høvdu onnur við okkum eisini funnið uppá. Innkomin gekk sjón fyri søgn, tí har var svart av fólki í øllum aldri. Men Birita Krossteig, sum eigur lítla handilin, fekk góða hjálp, bæði frá døtrum og manni, at avgreiða og vegleiða øllum kundunum.